# Vitja Café Grugg á ólavsøku

## Tjóðpallur Føroya skipar fyri café á Meiarínum

SJÓNLEIKUR

Væleyndaða ólavsøkutiltakið frá í fjør við Café Grugg á Meiarínum, verður endurtikið í ár, tó við nýggjum gestum.

Ólavsøkuaftan kl. 22.00 og Ólavsøkudag kl. 20.00 & kl. 22.00 verður høvi at fara á Café Grugg á Meiarínum, har borðreitt verður við góðum tónleiki og sjónleik.

Eins og í fjør kunnu ólavsøkugestir hvíla beinini eina løtu, fáa sær ein góðan kaffimunn og njóta eina sýning við bæði gaman og álvara Pallurin er eitt vertshús, eitt leygarkvøld í Havn ella kanska onkra aðrastaðni, har tey "skeivu" fólkini, sum annars blíva biðin um at halda munn, koma til orðanna. Smáar gerandissøgur um stóran kærleika, lívs- lagnur og lygnir, vónloysi og lívsgleði, verða flættaðar saman við livandi tónleiki og sangi.

Tey leikandi, ið eisini hava skrivað leikbrotini eru: Ria Tórgarð, Barabara Christophersen, Hans Tórgarð, Gutti Winther og Kjartan Hansen.

Súsanna Tórgarð hevur leikstjórnað.

Innrættað café og staðið fyri ljósinum og ljóðinum hava Símun Pauli Hansen, Turpin N. Djurhuus, Árni Baldvinson og Jónas Bloch Danielsen. Búnum og rekvisittum hevur Katrin Bonde staðið fyri.

Atgongumerki fáast við dyrnar ein tíma undan sýning.





## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 18 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn ella mjørki eitt skifti. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið Ólavsøkuaftan og Ólavsøkudag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og eystri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 19 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 11 |
| Nuuk | 14 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 20 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 35 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 34 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | -- |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 34 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 28 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1010 hPa. yvir Eysturlandinum fer vestureftir og grynnist. Brúgvalagið til Føroya fer í útnyrðing.



**Í dag:**
Hátrýstið yvir Suður-Skandinavia sendir lýggja luft av landsynningi móti Føroyum

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/07 kl. 06⁰⁰ – 20/07 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 19/07 kl. 06⁰⁰ – 20/07 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juli: 68 mm





Lesið Sosialin


## VESTFALLSKYRRINDI

14. juli Mánin longst frá jørðini
18. juli Fullmáni
25. juli Seinna kvarter
30. juli Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. juli | 10:55 | 23:15 | 9:55 | 22:15 | 10:10 | 22:30 | 0:35 | 12:55 | 1:35 | 13:55 | 9:10 | 21:30 | 8:10 | 20:30 | 11:10 | 23:30 | - | 12:10 | 10:40 | 23:00 | 11:55 | - |
| 24. juli | 11:36 | - | 10:36 | 23:27 | 10:51 | 23:42 | 1:15 | 13:36 | 2:15 | 14:36 | 9:51 | 22:42 | 8:51 | 21:42 | 11:51 | - | 0:30 | 12:51 | 11:21 | - | 0:15 | 12:36 |
| 25. juli | 0:27 | 12:52 | 11:52 | - | - | 12:07 | 2:27 | 14:52 | 3:27 | 15:52 | 11:07 | 23:54 | 10:07 | 22:54 | 0:42 | 13:07 | 1:42 | 14:07 | 0:12 | 12:37 | 1:27 | 13:52 |
| 26. juli | 1:39 | 14:04 | 0:39 | 13:04 | 0:54 | 13:19 | 3:39 | 16:04 | 4:39 | 17:04 | - | 12:19 | 11:19 | 23:45 | 1:54 | 14:19 | 2:54 | 15:19 | 1:24 | 13:49 | 2:39 | 15:04 |
| 27. juli | 2:30 | 14:54 | 1:30 | 13:54 | 1:45 | 14:09 | 4:30 | 16:54 | 5:30 | 17:54 | 0:45 | 13:09 | - | 12:09 | 2:45 | 15:09 | 3:45 | 16:09 | 2:15 | 14:39 | 3:30 | 15:54 |